# ítróttur

Nr. 36 • týsdagur • 22. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 16 | 13 | - | 3 | 41 | 15 | 26 | 17 |
| 2 TB | 16 | 13 | - | 3 | 38 | 23 | 15 | 17 |
| 3 Dráttur | 16 | 10 | - | 6 | 39 | 24 | 15 | 16 |
| 4 ÍF | 16 | 7 | - | 9 | 25 | 29 | -4 | 10 |
| 5 KÍF | 16 | 4 | - | 12 | 16 | 39 | -23 | 4 |
| 6 SÍ | 16 | 1 | - | 15 | 11 | 46 | -35 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 13 | 11 | - | 2 | 34 | 12 | 22 | 15 |
| 2 Fleyr | 13 | 9 | - | 4 | 31 | 20 | 11 | 13 |
| 3 Mjølnir | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 16 | 12 | 10 |
| 4 ÍF | 13 | 3 | - | 10 | 14 | 33 | -19 | 5 |
| 5 Fram | 13 | 1 | - | 12 | 11 | 37 | -26 | 1 |

# Spenningurin er í hæddini

**Kappingin um meistaraheitið í fremstu flogbóltsdeildini hjá kvinnum hevur sjáldan verið so spennandi, sum hon er í løtuni**

FLOGBÓLTUR

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*



*TB fekk hevnd fyri steypaósigurin, tá ið Mjølnir sunnudagin var og vitjaði í Trongisvági. TB vann dystin 3-0*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Trý lið liggja nú stavn um stavn og stríðast um meistaraheitið, og fyri spenningin í kappingini hevði tað stóran týdning, at TB í vikuskiftinum vann á steypavinnarunum úr Mjølnir.

### Hevndu steypaósigurin

Einir 200 áskoðarar vóru komnir saman til toppdystin í meistaradeildini hjá kvinnum, sum var í Trongisvági sunnudagin millum TB og Mjølnir. Umframt at verða ein avgjørdur toppdystur, so var dysturin eisini eitt kærkomið høvi hjá TB at fáa hevnd fyri steypaósigurin móti Mjølnir undanfarna vikuskifti.

Ikki kann sigast annað, enn at TB gjørdi sær dælt av hesum høvi. Í einum spennandi og vælleiktum dysti, var tað fyri tað mesta heimaliðið, sum var við yvirlutan, og hýrurin á teimum trúfastu áskoðarunum var sera góður.

Í fyrsta settinum hevði TB munin at kalla allatíðina, og heimaliðið vann settið 25-18. Næsta settið var eitt sindur tættari, men eisini her var TB við yvirlutan og vann 25-23. Tað var sjón fyri søgn, at TB-liðið var ógvuliga uppsett at hevna ósigurin í steypafinaluni, og í triðja settinum hildu tær fram við ágrýtna spælinum hjá sær. TB vann triðja settið 25-19, og harvið syrgdu tær fyri, at spenningurin í meistaradeildini hjá kvinnum er í hæddini.

### Dráttur liggur væl fyri

Tað eru ikki bara TB og Mjølnir, sum stríðast um meistaraheitið, tí eisini Dráttur liggur væl fyri. Dráttur vann hóskvøldið 3-0 á grannunum úr SÍ, og tær eru einans eitt stig aftan fyri bæði TB og Mjølnir á stigatalvuni.

Dráttur hevur í seinastuni vunnið á bæði TB og Mjølnir á útivølli, og tá ið tær skulu spæla móti hinum báðum oddaliðunum aftur í endaspælinum, eru tær á heimavølli á Giljanesi. Tí er Dráttur óivað eitt sera gott boð upp á ein komandi føroyameistara, eisini tí at liðið tykist verða kanska tað best koyrandi í løtuni.

At tær so eisini hava heimavøll í dystunum móti hinum oddaliðunum, ið eru eftir at leika, gevur teimum helst eisini ein fyrimun,og hjá Drátti er setningurin greiður - Vinna tær allar dystirnar, ið tær hava eftir, ja so eru tær føroyameistarar 2005 í kvinnuflogbólti!

Ein annar dystur í meistaradeildini hjá kvinnum var um vikuskiftið, og hann var á Kambsdali, har tvey av niðaru liðunum, ÍF og KÍF, dystaðust. Hesin dysturin gjørdist ongantíð serliga spennandi, tí fuglfjarðakvinnur vóru greitt við yvirlutan og vunnu dystin 3-0. Tað var bert í tí fyrsta settinum, at tað gekk javnt á. Í bæði næsta og triðja settinum var ongin ivi um, hvat var betra liðið.

# Sørvingar stevna beint móti greipuni

**Mansliðið hjá SÍ hevur beina kós móti greipuni í flogbólti, og ilt er at ímynda sær, at teir skulu snáva á leiðini**

FLOGBÓLTUR

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Tey flestu hava langt síðani staðfest, at tað verður SÍ, sum í ár fer at vinna føroyameistaraheitið í mansflogbólti. Sørvingar hava ligið á odda ein stóran part av kappingarárinum, og hesar seinastu vikurnar hava teir bara økt um leiðsluna hjá sær.

### Vunnu á nærmastu kappingarneytunum

Sunnudagin hevði SÍ vitjan av Fleyr, sum er nærmasti kappingarneytin hjá sørvingum, men dysturin vísti bara, hvussu nógv sterkari enn hini liðini, ið SÍ er. Sørvingar vunnu dystin greitt, og í veruleikanum var ongantíð nakar serligur spenningur um úrslitið.

Fyrsta settið var skjótt avgreitt, og tá ið avtornaði, høvdu sørvingar vunnið fyrsta settið 25-13. Í tí næsta settinum var heldur ikki nakar serligur spenningur. SÍ fór beinan vegin frá havnarliðnum, og heimaliðið vann settið greitt 25-14.

Triðja settið var tað frægasta hjá Fleyr, men tað var tó framvegis ikki nóg mikið til at koppa SÌ, sum vann settið 25-20, og harvið vunnu sørvingar dystin 3-0.

Ein annar dystur var í meistaradeildini hjá monnum sunnudagin, og hann var á Kambsdali millum ÍF og Fram.

Tað var Fram, sum byrjaði dystin best, og havnarliðið vann eisini fyrsta settið greitt. Í næsta settinum var tað eisini Fram, sum fekk bestu byrjanina, men so líðani fótaðu fuglfirðingar sær, og ÍF vann eftir tógvið stríð settið, og so stóð á jøvnum 1-1.

Fuglfirðingar vóru nú komnir fyri seg, og teir vunnu tey bæði næstu settini rættuliga sannførandi, og harvið vunnu teir dystin 3-1.

SÍ er greitt á odda í meistaradeildini hjá monnum, og tað hevði verið einki minni enn ein sensatión, um føroyameistaraheitið skuldi kiksað hjá teimum.



*SÍ vann sunnudagin 3-0 á Fleyr, og sørvingar eru nú at kalla greipuvinnarar í mansflogbólti*

*Savnsmynd*